# Brandur við í danskari sjónvarpssending

**Brandur Enni skal í hesu vikuni verða við í kendu sjónvarpssendingini »Snurre Snups Søndagsklub«, har skemtiligi Bubber er vertur**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Í dag fer Brandur Enni saman við øllum dansigentunum við flogfarinum til Danmarkar, har tey skulu vera við í eini væl umtóktari danskari sjónvarpssending.

## Brandur og Bubber

Talan er um kendu sendingina »Snurre Snups Søndagsklub«, sum navnframi Bubber er vertur á. Sendingin hevur verið á skránni hjá TV2 síðani 1994, og er sera væl umtókt millum donsk børn og ung.

»Snurre Snups Søndagsklub« er ein av teim sendingunum, sum hevur flest hyggjarar í danska ríkinum

Í sendingini fær Bubber vitjan av kendum tónleikurum, og millum tey, sum hava verið við, finna vit nøvn sum Me & My, Gnags, EyeQ og Blue. Men nú er tíðin so komin til at eitt føroyskt navn eisini verður at síggja í hesu rúgvuni.

Brandur skal saman við dansigentum sínum framføra nøkur løg, og eisini verður pláss til onkurt prát við ungu pop-stjørnuna úr Føroyum.

Harafturat verða onkur videoklipp av Brandi á palli í Føroyum víst.

## Stór avbjóðing

Hetta er sjálvandi ein stór avbjóðing fyri unga tvøráamannin, og spennandi verður at vita, hvussu hann fer at klára seg.

Manningin aftanfyri Brand hevur síðan fløguútgávuna »Waiting in the Moonligt« gjørt eina roynd í at røkka uttanlands við tónleikinum hjá Brandi, og luttøkan í »Snurre Snups Søndagsklub« er eitt úrslit av hesum arbeiðið.

Sendingin verður tikin upp longu nú fríggjadagin, og verður hon víst á TV2 sunnudagin tann 16. mai millum klokkan 09.00 og 11.00 føroyska tíð.



*Brandur Enni skal saman við dansigentunum fer nú at royna seg uttanlands eisini*

## Tøkk

Eina hjartans tøkk til tykkum mongu, ið sýndu samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi, verpápi, abbi, langabbi og bróðir

**Hans Jacob Nielsen**
**Sumba**

so brádliga andaðist.
Takk til prestarnar Jónsvein Bech og Marionnu Telling.
Takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Takk fyri kransar, gávu til kirkjuna, uppringingar og takk til tykkum, sum vitjaðu inn á gólvið.
Ein serlig tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til í missiónshúsinum og á annan hátt.
Gud signi tykkum øll.

*Fyri tey avvarðandi*
**Borglyn**
**Tummas, Johannes, Sanna og Sólvá**





GSM FRÍTÍÐ

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*





# Dugir tú at tekna?



## Fá arbeiðsroyndir til at søkja inn á reklamuskúla ella grafiskan skúla

Kundi tú hugsað tær at farið á grafiskan designskúla ella reklamuskúla? So bjóðar reklamuhúsið Sansir tær arbeiðsroyndir, áðrenn tú søkir.

Den Grafiske Højskole og Danmarks Designskole mæla til, at tú hevur arbeiðsroyndir, áðrenn tú søkir. Vilt tú hava upplæring hjá Sansum, er tað ein fyrimunur, um tú hevur studentsprógv, HF, HH ella líknandi.

Tú mást duga væl at tekna. Ríkt hugflog og góður sansur fyri litum og formi er eitt krav. Og hevur tú ans fyri tónleiki, ger tað ikki støðuna verri.

Eitt lætt lyndi, góð samstarvsevni og evnini at arbeiða í bólki eru eisini neyðug at hava í viðførinum.
Skriva nøkur orð um teg sjálva/n. Ger eina mappu við tekningum og øðrum grafiskum tilfari, sum tú sjálv/ur hevur gjørt. Og send okkum tað ella kom inn á gólvið við tí. Tú fært tilfarið aftur.

Kunnu vit ikki taka dagar ímillum innkomna tilfarið, fara vit at geva tær eina grafiska uppgávu at loysa, sum vit síðan taka støðu út frá.

Seinasta freist at søkja er týsdagin 14. mai 2002. Tú skalt byrja 5. august 2002.

SANSIR

PF. SANSIR • REKLAMUHÚS • POSTBOKS 1099 • TINGHÚSVEGUR 47 • 110 TÓRSHAVN • TEL 355 355 • FAX 355 350 • SANSIR@SANSIR.FO • WWW.SANSIR.FO

Sansir eru eitt virki, ið tekur sær av heildarsamskifti. Hugskotið er berandi styrkin. Vit hjálpa virkjum við samskifti, so tað svarar til samleikan og mentanina hjá einstaka virkinum.

Sansir hava drúgvar royndir í at geva virkjum eina útsjónd. Vit leggja til rættis og greiða lýsingarherferðir. Og vit hjálpa virkjum við kunning, tíðindaskrivum og líknandi.

Sansir brúka eisini internetið sum eitt arbeiðsamboð í samlaðu marknaðarføringini.
Á Sansum arbeiða sjey fólk. Vit eru at hitta á www.sansir.fo